LM-053/2025

Løgmálaráðið

Dagfesting: 21.11.2025
Mál nr.: 25/23488
Málsviðgjørt: MV

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
...	Aftan á § 6, men áðrenn yvirskriftina yvir § 7, verður sett: **§ 6 a.** Fyri at økja um trygdina á serliga útsettum støðum í kommununi, kann kommunustýrið í samráð við politiið og eftir tilmæli frá politinum, yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli. *Stk. 2.* Tilmælið frá politinum er galdandi í tvey ár. *Stk. 3.* Upptøkur fevndar av stk 1 kunnu einans gevast víðari til politiið til tess at politiið kann kanna og avdúka álvarsom lógarbrot. Upptøkur fevndar av stk. 1 kunnu viðgerast av øðrum enn politinum, um hetta er neyðugt í samband við ítøkilig revsimál. *Stk. 4.* Upptøkur fevndar av stk. 1 skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna. *stk. 5.* Kommunan, sum setur upp vakmyndatól sbrt. stk. 1, er dátuábyrgdari.”

§ 9. Dátueftirlitið hevur eftirlit við viðgerð av persónupplýsingum sbrt. § 8. *Stk. 2-3 ...*	Í § 9, stk. 1 verður "sbrt. § 8" broytt til: "sbrt. §§ 6 a og 8".
§ 10. Brot á § 2, § 7, stk. 1, § 9, stk. 2, 1. pkt. og § 9, stk. 3 verður revsað við sekt. *Stk. 2-6 …*	Í § 10, stk. 1 verður aftan á "§ 2," sett: "§ 6 a, stk. 1, 3 og 4,".